# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Sofus Poulsen í Lítluvík:

## Hvør málningur sigur sína søgu

Fríggjadagin 5. mai kl. 15 letur Sofus Poulsen listamaður upp eina øðrvísi listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík við umleið 50 oljumálningum.

Sofus Poulsen sigur, at myndevnini á ein hátt eru ein leitan inn í nútíðina, har hvør einstakur málningur sigur sína søgu. Fyrr tráaði hann eftir at finna sín egna stíl og avmynda veruleikan, meðan hann í dag málar veruleikan.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 9. mai. Opið er: Fríggjadag: kl 15-18, leygardag: kl. 12-18, sunnudag-týsdag: kl. 15-18



*Fríggjadagin 5. mai kl. 15 letur Sofus Poulsen listamaður upp eina øðrvísi listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*




*F.v. Kristoffur Fonsdal, Byrger Heinesen, Edmar Joensen, Sjúrður Kjølbro, Pauli Magnusson, Olgar Hansen, Johan á Lava, Sámal Jákup Hansen, Jógvan Fróðin Hansen, og Jákup Joensen (fremst á myndini).*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Leið meg einaferð enn út á dekkið

Tá Dúgvan leygardagin 29. apríl sigldi sín seinasta túr um Leirvíksfjørð, vóru fleiri av teimum, ið fyrr hava verið skiparar á Leirvíksleiðini við.

Á myndini eru teir saman við manning á Dúgvuni.

Hasir á myndini hava allir verið skiparar á Leirvíksleiðini gjøgnum tíðirnar.

# Talv-evnisvika í Vík




*Her síggja vit allar luttakararnar*




*Her síggja vit næmingarnir sita hugagóðir og dystast við hvíta og svarta fólkinum í hesum elligamla spæli, sum sær út til at vinna meira og meira fram millum børn og ungdóm*

Haldórsvíkar- og Tjørnuvíkar skúli høvdu herfyri eina evnisviku saman, har evnið var talv. Næmingarnir numu sær meira kunnleika um talvspæl og dystaðust eisini

Spennandi ítrótturin, sum talvið er, var sett á dagsskránna fyri hesar skúlar eina heila viku herfyri. Hetta var tó bert fyri næmingar frá 3.-7. flokk. Teir yngru næmingarnir arbeiddu við evninum „fjøruni" og lærdu matgerð.

Talvtiltakið var hildið í Avhaldshúsinum í Vík. Talvvenjari var danin, Mogens Nielsen, sum undirvísir í talvi á Sandoynni.

Byrjað var hvønn morgun við innlæring í talvi, og seinni var so talvkapping á skránni, sum endaði við, at medaljur vóru býttar út seinasta dagin, fríggjadagin.

Tað var týðiligt, at næmingunum dámdu væl at telva. Teir hava gjørt nakað við hetta undan hesari evnisviku.

Mogens sigur, at tú lærir nógv við at telva. Hetta kann eisini koma næmingunum til góðar í øðrum lærugreinum. Hann nevnir, at í USA eru royndir gjørdar, ið vísa, at næmingar, ið telva, klára seg betri í øðrum lærugreinum. Hví er hetta so?

Tú lærir at hugsa, at miðsavna teg og at brúka heilan á ein kreavtivan hátt. Um tú gert ein feil, so kann hetta fáa stórar avleiðingar. Tí skalt tú vera umhugsin. Neyðugt er at gera tær eina ætlan, og vita um hon heldur. Tú mást eisini fylgja við í tí sum mótstøðumaðurin ger. Tað ræður um ansni, men eisini um at gera nakað við kongin hjá mótstøðumanninum.

Tað ræður um at fella kongin hjá hinum fyrst!

Ein góð vika var komin at enda. Mogens lat væl at tiltakinum og helt, at næmingarnir vístu ídni og góðan vilja í sínum spæli. Hann heldur, at hetta kundi eisini verið nakað, ið aðrir skúlar settu á skránna, har tú tekur nakrar dagar úr kalendaranum til hetta.